Skúlastýrisfundur 04.03.2025

Møtt vóru: Rakul Borg Brattaberg, Hans Allan Niclasen, Barbara Brattaberg, Rakul í Lágabø Hjørdis Simonsen og skrivarin John Henrik Holm. Jonleyg Finndóttur hevði forfall

Skrá:

1. Skipan av skúlastýrinum
2. Arbeiðsuppgávan hjá skúlastýrinum
3. Eitt sindur um Vágs Skúla
4. Mál at taka upp komandi tíðina

Ad. 1

Tá vit skipaðu okkum var Jonleyg Finndóttur við á telefonini. Skúlastýrinum skipaði seg við Rakul Borg Brattaberg som forkvinna og Hans Allan Niclasen sum næstformanni. Skúlastýrið heiti á John Henrik um at vera skrivara.

Ad. 2

Tað eru fyrst og fremst foreldrini, ið varða av børnunum, og tí er sjálvsagt, at tey eru við til at taka avgerðir og seta dám á virksemið í tí skúla, har børn teirra ganga. Foreldraumboðini hava leiðsluna í skúlastýrinum, og tað eru foreldraumboð, sum eru bæði formaður og næstformaður í skúlastýrinum.

Skúlastýrið hevur eftirlit við virksemi skúlans og hevur m.a. hesar uppgávur:

1. Ásetur meginreglurnar um virksemi skúlans m.a.: • samarbeiðið millum skúla og heim • næmingafráverur • fráboðan til heimini um úrtøku næminganna í undirvísingini • foreldrafundir, setursskúla og onnur felags tiltøk

2. Ger við støði í ásettum reglum atferðarreglur skúlans og umsjónina við næmingunum í skúlatíðini.

3. Ummælir árligu fíggjarætlanina fyri skúlan og leggur tey mál fyri kommunustýrið til góðkenningar, ið bera fleiri útreiðslur við sær, enn ásett er í fíggjarætlanini.

4. Viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygging og umbygging í verandi skúlum

5.Viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað í kommununi og broytingar í galdandi skúlabygnaði

6. Góðkennir eftir tilmæli frá námsfrøðiliga ráðnum teir undirvísingarmiðlar, sum skúlin skal brúka.Møguligar arbeiðsuppgávur hjá einum sosialráðgeva í einum skúla:

Skúlastýrið hevur ein stóran leiklut í arbeiðinum at menna einstaka skúlan. Skúlastýrið ásetir meginreglur, og er bindilið millum foreldur og skúla. Skúlastýrið er eisini samstarvsfelagi hjá leiðslu skúlans at gera fyriskipanir, so at skúli og foreldur í felag menna undirvísingarliga og sosiala umhvørvi skúlans, har dentur verður lagdur á trivnað og læring hjá øllum næmingum. .

Harumframt samstarvar skúlastýrið við kommunustýrið um skúlabygnað og fíggjarligu- og hølisligu umstøðurnar í skúlanum

Ad. 3

John Henrik greiddi frá um skúlan. Herundir næmingartal og starvsfólkatal. Vit høvdu eisini eina gjøgnumgongd av endamálsorðing fólkaskúlans og kjakaðust um "hví man gongur í skúla". Eftir kjak og gjøgnumgongd av virksemi skúlans vísti John Henrik skúlastýrinum runt á skúlanum og vit tosaðu um tær ábøtur/nýgerðir sum standa fyri framman.
Tá vit gingu runt á hádeildsgongini var tosað um eitt uppihaldsrúm til næmingarnar í fríkorterinum. Skúlastýrið skeyt upp at opna bókasavnið og tað gera vit í morgin, sum eina roynd.

Ad. 4

Næsti fundur er ásettur til 9. apríl kl. 17:00. Um nakar hevur mál á skrá vera hesu at sendast til Rakul Borg Brattaberg forkvinnu í skúlastýrinum. Vit senda út skrá til komandi fund 10 dagar áðrenn fundin

Rakul Borg Brattaberg

Hans Allan Niclasen

Barbara Brattaberg

Jonleyg Finnsdóttur (lisið)

Rakul Í Lágabø

Hjørdis R. Simonsen